## VIÐMERKINGAR

# Alibi fyri at knúsa búskapin

**Høgni Hoydal**



Útvarp Føroya hevur eins og oddagreinar í Sosialinum fleiri ferðir roynt at mana stór undirskot fram á fíggjarlógini. Hesi tíðindi eru bygd á, at um vit sleppa búskaparstýringini og ongi tiltøk seta í verk á fíggjarlógini, so verður undirskot.

Ja, tað skal eg halda við. Men tað er júst tí, at vit skulu hava politikarar, sum kunnu halda skil á búskapinum.

Ábyrgdarleysur tíðindaflutningur kann bert gerast eitt alibi hjá politikarum fyri at knúsa búskapin.

Tá Anfinn Kallsberg valdi at skriva út val, lá eitt uppskot til fíggjarlóg á borðinum, sum gav yvirskot. Uppskotið hjá Karsten Hansen bygdi á, at sparast skuldi á fyrisitingarútreiðslum landskassans og at nýggjar inntøkur skuldu útvegast. Til hetta kravdust fleiri lógarbroytingar, sum eisini vóru lagdar fyri tingið. Harímillum vóru eisini tey uppskotini um avgjøld, sum aðrir flokkar gjørdu gjøldur burturúr.

Men við valinum duttu øll uppskot burtur. Karsten Hansen varð sendur til hús og síðani hevur ongin politisk stýring verið á landskassanum.

Nú borðreiða bæði Útvarp Føroya og oddagreinar í Sosialinum við tí boðskapi, at stórt hall verður á fíggjarlógini. Hetta er bygt á, at allar útreiðslur bara verða framskrivaðar og hækkaðar, soleiðis sum tølini vóru á fíggjarlógini fyri 2003. Og hetta er bygt á, at inntøkurnar verða minni, tí tey tiltøk, ið Karsten Hansen legði fram, verða ikki framd.

### Skal ongin stýra búskapinum?

Men hetta er ábyrgdarleysur tíðindaflutningur. Tøl verða slongd út, sum ikki hava hald í veruleikanum – og tað er skjótt at kanna hjá Fíggjarmálaráðnum. Tølini, sum Útvarp Føroya ber fram sum tíðindi, eru politiskt litaðar metingar.

Og onki verður spurt um, hvat ein nýggj samgonga skal gera fyri at taka teymarnar upp, eftir at landskassin hevur ligið í stjórnarloysi í tveir mánaðir.

Sjálvandi skulu politikararnir tryggja, at skil verður í búskapinum. Sjálvandi skulu politikararnir hava rygg til at spara og at útvega landskassanum neyðugar inntøkur. Og tað er hetta, sum ein ábyrgdarfullur tíðindaflutningur átti at hugt at.

### Alibi fyri at tøma landskassan?

Eg eri stórliga bangin fyri, at tílíkur ábyrgdarleysur tíðindaflutningur kann fáa sera ringa ávirkan á búskapargongdina, um fólk trúgva tí.

Verri er tað, at tað tykist sum, at nú verður roynt at finna eitt alibi fyri, at ein komandi samgonga fer at sleppa teymunum og bara brúka av tí uppsparda penginum í Landsbankanum til at fíggja eitt undirskot.

Haldi meg eisini hoyra, at leiðandi politikarar rógva fram undir, at studningur skal latast vinnuni til tess at fáa »hjólini at mala aftur«.

### Aftur í 80'ini eftir fáum vikum

Er hetta tað, sum liggur í kortunum, so mugu vit staðfesta, at tað tekur bert fáar vikur at enda afturi í 80'unum. Tað tekur bert fáar mánaðir at bróta alt tað niður, sum er bygt upp, um endamálið er at prógva, at vit onki megna í Føroyum.

Rakstraræltlanirnar hjá øllum teimum virkjum og fyritøkum, ið fingu studning í 80'unum, vístu jú altíð eitt stórt hall, um studningurin ikki varð tikin við. Tað bar jú altíð til at prógva, at onki kundi hanga saman uttan stóran studning.

Um tað er henda politikkin vit ynskja fyri Føroya land, so er tað ongin kunstur. Tað er lættasta ting av verðini at seta seg upp afturá og lata slúsurnar upp. Tað er lættasta ting av verðini at siga, at vit fáa onki gjørt, tí nú er so langt liðið út á árið.

Men fjølmiðlarnir áttu at verið meira at sær komnir enn at latið politikararnar sleppa við tí.

# Vanæra

**Don Petersen**

Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin ætla sær at vanvirða føroyska flaggið og tjóðsangin: »Tú alfagra land mítt«.

Nú veruligar samgongusamráðingar eru farnar í gongd millum Javnaðarflokkin, Fólkaflokkin og Sambandsflokkin minnast føroyingar flestallir fótbóltslandsdystin millum Føroyar og Danmark í Gundadali.

Undan dystinum kom bólkur av sambandsfólki inn á áskoðaraplássini við einum av valevnum teirra á odda íklæddir donsku litirnar, reytt og hvítt, við donskum fløggum og klapphattum og hildu miklan gang meðan teir sungu »vi er røde vi er hvide«.

Tá føroyski tjóðsangurin bleiv sungin, ýldu sambandsmenn »BUUUH«, meðan teir hinvegin sungu danska »yndiga landið« av fullum hjarta.

Føroysku leikararnir allir stríddist mennskir av fullum huga og stóðu dønum javnir í leiki bæði tekniskt og kroppsliga, men hvørja ferð føroyskur leikari og dani brustu saman og danin fall, ýldu hesir sambandsmenn »BUUUH«.

So hvørt sum dysturin leið, og okkara fólkakæri, mæti, sterki og ágangandi álopsleikari Todi nærkaðist danska málinum og fleiri ferðir var um at fáa mál, nevaði danski málverjin ferð eftir ferð upp í andlitið á Toda.

Sambandsmenninir ýldu: »SLÁ, SLÁ«.

Hetta fólkaslagið ætlar Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin sær í samgongu við.

Gera teir álvara av tí, eru føroyingar greiðir yvir, hvat teir standa fyri!

Føroyingar er tolið fólkaslag, tí ein kann ímynda sær, hvat vildi hent, um bólkur av onglendingum hevði tíggjað sær á sama hátt undir landsdysti millum Ongland og Týskland á Wembley.

# Felags foreldramyndugleiki – ein rættur fyri øll børn

TÍÐINDASKRIV

Løgtingið hevur samtykt ST Barnakonventiónina, sum áleggur limalondunum at verja børnini og somuleiðis at syrgja fyri at øll børn hava nøkur grundleggjandi rættindi – m.a. rættin til bæði foreldrini og rættin til sína familju.

Í Føroyum er hetta í dag ikki ein rættur hjá børnunum hvørs foreldur eru ógift ella fráskild. Børnini hava ongan rætt yvirhøvur, men tað er bara, í flestu førum, mamman, sum hevur rætt til børnini. Børn, hvørs foreldur eru fráskild, eru bundin av, at foreldramyndugleikin – um tað so er mamman ella pápin er líkamikið – vil samarbeiða við hitt foreldri um børnini.

Vit hava enn tað gomlu myndugleikalógina frá 1922, sum er frá eini tíð, har pápin í minni mun enn í dag tók lut í umsorganini og uppælingini av børnunum. Tí er tónin í lógini eisini, at mamman pr. defenitión er hon, ið dugur at taka sær børnunum. Pápin er hinvegin pr. defenitión ikki egnaður at hava ábyrgd av børnunum. Tá lógin áleggur myndugleikunum at velja annað foreldrið frá eftir hjúnarskilna, verður tað tí oftast rættin til pápan børnini missa.

Ein sannroynd er, at nógvir pápar stríðast sum úlvur á skóg fyri at hava eitt rímiligt samband við síni børn. Alla staðir er tað, sum at renna ímóti einum múri! Boðini alla staðir frá eru, - tað er mamman, sum altíð hevur rætt at avgera í hvønn mun sambandið millum børnini og pápan skal vera møguligt.

Í flestu førum er tað tíbetur soleiðis at tørvurin hjá børnunum á báðum foreldrunum vigar mest hjá foreldramyndugleikanum, soleiðis at tað ber til at gera rímiligar avtalur um samveru.

Hinvegin eru tíverri eisini nógv dømir um, at persónligt agg, bitturheit og enntá hatur til hjúnarfelaga, sum valdi at fara, er so stórt at tað (skuggar) forðar fyri øllum rímiligheitum.

Ofta verður hetta til, at børnini verða brúkt sum eitt vápn til – »hetta skal tú fáa afturlønt«. Rætturin og enn minni tørvurin hjá børnunum at vera saman við í flestu førum pápanum, fánar heilt burtur.

Gamaní, Ríkisumboðið ásetir í flestu førum ein minsta samverurætt til pápan, men hetta er ikki eftir tørvinum hjá børnunum, men eftir tí vanliga »retspraksis«.

Nógv dømir eru um pápar, sum støðugt noyðast at skriva brøv til Ríkisumboðið fyri at verja seg ímóti íspunnum ákærum um bæði líkt og ólíkt frá mammuni at børnunum í eini roynd at taka enn meira av samverurættinum. Langt ífrá altíð er neyðugt hjá mammuni at prógva ákærurnar, fyri at Ríkisumboðið gongur hennara krøvum, um at avmarka samveruna, á møti!

Børni eru fullkomiliga verjuleys! Mamman hevur rætt til at frátaka børnunum møguleikan til rímiligt samband við fyrst og fremst pápan, men eisini alla pápafamiljuna annars. Nógv dømir eru um, at børnini ongantíð sleppa við til nakað, sum familjan øll annars er saman um. Mamman sigur nei, tí tað merkir at pápin eisini er til staðar, – og hann hevur ikki rætt at síggja børnini uttan fyri tey ásettu samveruvikuskiftini, tí skulu hesi stakkals børn heldur ikki við.

Børnini hava ikki rætt til eina føðingardagsheilsan frá pápanum, um mamman vil frátaka pápanum henda møguleikan.

Nú glógvar vónandi fyri framman. Í valtríðnum hesaferð hava fleiri politikkarar tikið henda trupulleikan upp, sum nakað tey vilja arbeiða við. Ein skipaði enntá fyri einum fundi, har sálarfrøðingur, umboð fyri Almannastovuna og umboð fyri barnaverndina í Havn søgdu frá sínum royndum.

Øll vóru tey á einum máli um, at hetta er eitt serstakliga forsømt økið og at her má okkurt gerast. Umboðið fyri Almannastovuna segði beinleiðis, at tað er »flóvisligt« at verða uttanlands og vara av eini so gamlari skipan, har rættarstøðan hjá hesum børnum er so út av lagið vánalig.

Nógvir pápar stríðast hvør í sínum lagi, men koma tíverri ikki altíð líka langt við hesum einsamallir. Tí eru vit nú nøkur, sum hava sett okkum fyri at samla allar hesar kreftir til eitt felags stríð, fyri at halda politikkarunum fast við tey úttalilsir, teir eru komnir við í valstríðnum. Fyrr enn myndugleikalógin er dagførd til samfelagið vit liva í í dag, broytist einki hjá børnunum.

Í Danmark hava tey »Foreningen Far«. Vit stíla eftir einum líknandi felagið. Men vit vita, at tað ikki bara eru pápar, sum eru við skerdan lut. Vit vita eisini at tann størsti taparin í øllum hesum eru børnini. Tí hava vit valt at endamálið hjá felagnum skal verða rætturin hjá børnum.

Okkara útgangsstøðið er, at øllum børnum eigur at verða tryggjað felags foreldramyndugleika. Líka so lætt, sum tað er í dag, at taka mynduleikan frá pápanum, líka so torført skal tað framyvir verða at taka myndugleikan frá øðrum foreldrunum.

Foreldrini skulu hava skyldu til at verja henda rættin hjá børnunum og at samarbeiða út frá hesum. Tað skal ikki vera nokk, at mamman t.d. sigur, at tað ikki ber til at samarbeiða fyri síðan at fáa allan rættin einsamøll. Tá skal t.d. Ríkisumboðið, sum í dag umsitur hetta økið, hava skyldu til við serkønari hjálp at hyggja nærri eftir, hvat og ikki minni hvar trupulleikin er.

Vónandi eru tit nógv, ikki bara pápar ella mammur, við ella uttan myndugleika, men eisini øll tit onnur, sum standa hesum børnum nær. Jú fleiri vit eru, jú betur! Tað er ikki neyðugt at øll eru virkandi í felagnum, men tað ber eisini til at gerast stuðulslimir.

Øll tit sum hava áhuga í antin at vera virkandi ella stuðulslimur í einum slíkum felagi, sendi ein teldupost til »Børn uttan rættindi« bur@hotmail.com.

Tá vit hava eina mynd av, hvussu áhugin verður, verður skipað fyri einum stovnandi aðalfundi. Helst ongantíð ov skjótt!!! siga stigtakararnir í tíðindaskrivinum.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Torrey Lindberg 80 ár



Leygardagin 24. januar fylti Torrey Lindberg í Klaksvík 80 ár. Hann er ættaður úr Trongisvági, sonur Hansinu og Andreas Lindberg. Hansina var ættað av Víkum, húskið flutti seinni til Gásadals at búgva. Andreas varð vanliga nevndur Andreas í Beitinum har suðuri.

Torrey vaks upp í stórum systkinaflokki, tí Hansina og Andreas fingu 11 børn, 9 dreingir og 2 gentur. Børnini vóru:

Maria (Mia) var gift við Pola Mohr Mortensen. Tey búðu fyrst í Vágum, síðani í Havn.

Jacob sigldi úti í eina tíð og búsettist so í Hillerød.

Jens búði í Keypmannahavn.

Hermund doyði av sjúku 14 ára gamal.

Hans búsettist á Havnarfirði í Íslandi.

Henry fór 16 ára gamal fyri kríggið við skúlaskipinum Danmark. Teir fóru inn í New York, skipið varð internerað, og manningin mátti í land. Henry vitjaði ikki heima aftur fyrr enn 20 ár seinni, tá hann var 36 ár. Hann býr í Florida.

Næstur í røðini er Torrey.

Elly giftist við Erning hjá Bókbindaranum, og tey búsettust á Tvøroyri. Hon er á lívi enn og var tað einasta av børnunum, sum búsettist har suðuri.

Hermund, uppkallaður eftir beiggjanum, sum doyði, býr í Helsingør.

Eilev er yngstur. Hann giftist við Kirstin Restorff, og tey búgva í Havn.

Systkinini vóru ongantíð heima í senn. Umframt henda stóra barnaflokk fostraðu Hansina og Andreas eisini móðurloysingin Frits Olsen upp. Hann giftist til Klaksvíkar við Inu.

Eftir lokna skúlagongd fór Torrey at arbeiða hjá einum kolafelag, sum helt til á Drelnesi. Hann sat á skrivstovuni í erva saman við Peturi Bærentsen. Undir krígnum varð Drelnes bumbað. Torrey var staddur á skrivstovuni, tá flogfarið kom, men náddi í evstu løtu niður, áðrenn bumban brast.

Í 1946 fór Torrey til Danmarkar á handilsskúla. Hann fór við Atlantsfarinum úr Klaksvík. Skipari var Jógvan Isaksen, sum átti skipið saman við Kjølbro. Við á ferðini var eisini næstelsta dóttir skiparan, Korintha, og tað man hava verið ein av teimum stóru romansunum í Norðuratlantshavi, tá tað rann saman millum hana og Torrey á ferðini. Tey giftust uppundir jól í 1947 og búsettust í Klaksvík. Tey fingu sonin Kára, sum er giftur við Mariu, f. Olsen í Gøtu.

Torrey fekk starv á mætastu skrivstovu í Klaksvík, hjá Kjølbro, har fleiri suðuroyingar og aðrir avbygdarmenn høvdu arbeiði. Klaksvíkingar sjálvir róðu út ella fóru á fjarleiðir.

Fyrst í 1960-unum fekk Kjølbro sær heilsølu. Torrey fór at starvast har, fyrst saman við Poul N. Kjølbro (Nølla) og Kristian Hvidbro. Seinni var hann leiðari á heilsøluni.

Í 1977 fór hann saman við soninum Kára at hava egnan handil, Norðoya Fruktsølu.

Torrey var eisini eitt skifti lærari á handilsskúlanum, sum var kvøldskúli, og hann hevði onkrar roknskapir um hendi.

Korintha hevur verið minnisveik í nøkur ár og er nú á tí nýggja røktarheiminum á Heygnum í Klaksvík. Torrey er birgur enn, sum tað eisini sæst á myndini, tikin 80 ára føðingardagin.

Hann situr ikki bara og bínir, men fer hvønn morgun av Garðavegi út á Bumshamarsveg, har Kári nú rekur heilsøluna. Har er hann stóran part av degnum, og tað sigst, at hann framvegis ger eitt sindur til nyttu. Torrey er annars nær knýttur at samkomuni í Betesda og gongur trúliga har.

Føðingardagin helt hann leygardagin á Klaksvíkar Sjómansheimi fyri einum 40 innbodnum gestum.

## Kári Svensson 50 ár



Í dag, 28. januar, fyllir Kári Svensson listamálari í Havn 50 ár. Kári er havnarmaður, sonur Hedvig, f. Johannesen, og Henry Svensson, ættaður úr Svøríki.

Eftir lokna skúlagongd byrjaði Kári at arbeiða í familjufyritøkuni P/F Demmus, fyrst í miðbýnum og síðaní SMS.

Kári hevur altíð havt hug til at mála, og sína fyrstu sjálvstøðugu framsýning hevði hann sum 15 ára gamal í framsýningarhølinum hjá Andori Eirikstoft í Fransabrekkuni í Havn. Hann var eisini við á Ólavsøkuframsýningum í 70- og 80-unum.

Fyri fimtan árum síðan gavst hann sum handilsmaður og fór at arbeiða sum listamaður burturav. Hann hevur havt framsýningar í ymiskum londum sum t.d. í Íslandi, USA og Singapore, tó hava tær flestu framsýningarnar verið í Danmark.

Kári er giftur við Louisu, f. Dam, úr Havn, tey eiga tríggjar døtur: Barbara, Ásla Rannvá og Beinta, sum allar búgva í Havn.

Í sambandi við føðingardagin letur Kári upp eina listaframsýning í listaskálanum undir heitinum »Hugbirtingar«. Framsýningin letur upp fríggjadagin 30 januar kl. 16.00. Á hesi framsýning verða 31 málningar, og á fyrsta sinni sýnir hann eisini 6 standmyndir.

Til framsýningina hevur Kári givið út eina snotuliga myndaskrá, sum sýnir um helvtina av myndunum á framsýningini. Jógvan Isaksen mag.art. og rithøvundur hevur skrivað tekstin. Framsýningin er ein ferðaframsýning, sum m.a. verður sýnd á Randers Kunstmuseum og aðrastaðni í Norðurlondum.

## Dagurin

**28. januar. Karlamagnus keisari,** deyður í 814. Eini 400 ár eftir deyða sín varð hann eftir uppskoti frá týska keisaranum Fríðriki Barbarossa skírdur halgimenni, men heitið varð inni viðurkent av pávanum í Róm. Karlamagnus hevur annars verið høgt í metum, ikki minst í Føroyum.

Karl er germanskt navn og merkir *maður.* Magnus er latínskt og merkir *stórur.*

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum
at kæri maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Kjeld Thomsen**
Tórshavn

andaðist á Landssjúkrahúsinum 26. januar
65 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Havnar Kirkju
hósdagin 29. januar kl. 13.00

*Familjunnar vegna*

**Poula, Bjarki, Malan, Finnur,
Sára og Ragnar**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum
at kæra kona, mamma, vermamma, omma
og langomma okkara

**Petra Ingigarð Sørensen**
fødd Petersen, Tórshavn

andaðist á Lágargarði fríggjadagin 23. januar,
76 ára gomul.

Kistan fer frá Lágargarði hóskvøldið kl. 17.00
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni
fríggjadagin kl. 14.

*Fyri tey avvarðandi*

**Amandus**

Tey ið vilja minnast Ingigarð við blómum ella kransi kunnu ístaðin
lata Lágargarði eina gávu – konto í peningastovnunum.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið á ymiskan hátt
sýndu samkenslu, tá ið okkara kæra mamma,
vermamma, omma og langomma

**Valborg Anna Maria Næs**
Tórshavn

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til sjúkrasystrarnar á B8.

Tøkk til prestarnar Bjarna Bæk og Meinhard Bjartalíð.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar og berarar.

Tøkk til Runavíkar Kommunu fyri vælvild
í sambandi við jarðarferðina.

Tøkk fyri blómur og kransar, og ein tøkk til
tykkum øll, sum hjálptu til við jarða rferðina
og fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Kaj Aage og Johanna**